# Biden lovar broytingar

Amerikanski varaforsetin, Joe Biden, segði um vikuskiftið, at við teirri nýggju stjórnini í Washington á odda fer USA at leggja eina aðra uttanríkispolitiska kós enn undanfarna stjórnin gjørdi. Sum dømi nevndi hann, at stjórnin fer at knýta sambandið við Russland aftur, og at hon er til reiðar at tosa við iranska stýrið. Joe Bioden segði tað vera alneyðugt hjá USA at bøta um sambandið við Russland, sum versnaði nógv orsakað av kreppuni í Georgia og ætlanunum hjá Bush-stjórnini um rakettverju í Eysturevropa.



# Ráðharri sleppur ikki frá

Í Týsklandi hevur Michael Glos biðið um at verða loystur úr embætinum sum handilsmálaráðharri, men flokkur hansara, CDU, vil ikki ganga umbøn hansara á møti, skrivar DPA. Val verður í Týsklandi um sjey mánaðir, og tað er ikki serliga hugaligt hjá handilsmálaráðharranum at fara til val, soleiðis sum støðan í búskapinum er. Sjálvur hevur hann mælt til størri skattalætta, men tað vil Angela Merkel, kanslari, ikki. Michael Glos, sum er 64 ára gamal, sigur, at yngri kreftir eiga at sleppa framat, og tí vil hann sleppa frá.

## Mest til tónleikarar og høvundar

**24 listafólk og rithøvundar fáa í alt 70 mánaðir at arbeiða í frá Mentanargrunni Landsins**

MENTAN

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.f o*

Tey trý, sum fingu mest vóru Marjun Syderbø Kjelnæs, rithøvundur, 3 ár, Jóhannus á Rógvu Joensen, tónleikari, 6 mánaðir og Jens L. Thomsen, tónleikari, 6 mánaðir.

Tilsamans vórðu latnar 94 mánaðarlønir fyri slakar 2,2 milliónir til týðingar og listaligt og mentanarligt arbeiði.

Í tíðindaskrivi sigur Mentanargrunnurin, at 72 umsøkjarar søktu um starvsløn fyri umleið 28 milliónir krónur, og av teimum vóru 27 umsóknir játtaðar.

Ongin íverksetanarstudningur varð latin í ár.

Endamálið við Mentanargrunni Landsins er, at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum.

Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinir.

Í nevndini fyri mentanargrunnur sita Jóanna Djurhuus, forkvinna; Ivan Niclasen, næstformaður; Steintór Rasmussen, Malan Marnersdóttir og Judith Johannessen

# Starvsløn í morgungávu

**Klokkan fýra í morgun vaknaði Marjuna S. Kjelnæs við boðunum um, at hon hevur fingið 3 ára starvsløn frá Mentanargrunninum**

MENTAN

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Myndin varð tikin, tá ið Marjun Syderbø Kjelnæs fekk Barnabókavirðisløn Tórshavnar býráðs 2008 fyri bøkurnar "Hvør fjalir seg í postkassanum?" og "Hvør fjalir seg í ferðataskuni?" Triðja bókin í røðini kemur út til várs, sigur hon við Sosialin*

Fartelefonin á náttborðinum avbrýtir náttina hjá familjuni Kjelnæs.

Við svøvntungari rødd svarar Dan Kjelnæs.

Tá hann skilir, at tað er Sosialurin, sum vil tosa við Marjuna, konu hansara, sum liggur og svevur so søtan undir liðini á honum, biðir hann okkum vinarliga um at ringja aftur seinni í dag.

- Klokkan er bara fýra, sigur hann.

Men hjá okkum nærkast hon middegi og deadline, og vit ætla at fáa eina viðmerking frá rithøvundanum Marjuni S. Kjelnæs, tí hon hevur fingið starvsløn í trý ár frá Mentanargrunni Landsins.

Men tað vita tey eftir øllum at døma onki um, tí tey eru støðd á einum neyðarsligum motelli uttan fyri Huston í statinum Texas í USA – Dan og Marjun og børnini Jórun og Christian, sum eru ávikavist 8 og 5 ára gomul.

### Visti av ongum

So hóast tíðindini hava ligið úti á Portalinum her heima allan fyrrapartin, eru vit tey fyrstu, sum bera teimum gleðiboðini um, at konan í húsinum nú endilga kann halga seg skrivilistina burturav komandi trý árini.

Tí hetta er tað, hon allarhelst vil. Og orsøkin til, at hon hevur søkt Mentanargrunnin um at sleppa at skriva í friði og náðum.

- Jamen, so rokni eg bestemt við, at hon vil snakka. Bíða líka, sigur Dan, og í bakgrundini hoyra vit hann vekja konuna

- Marjun vakna... Marjun, tú hevur fingið starvsløn í trý ár.

Og nú kemur hon sjálvandi í hornið.

Glað, hálvvakin og forvirrað.

- Meinar tú tað. Bíða líka, eg má líka klípa meg í armin, tí eg haldi at eg droymi. Nei, tað geri eg ikki. Hvat sigur tú? Tað hevði eg virkuliga ikki roknað við.. hetta er fantastiskt, sigur hon.

Næstu minuttirnir eru ein hurlivasi við ringum sambandi, skurri og fagnaði. Hon kemur fram á gólv. Letur seg skeivt í upp á bein og hon og maðurin flenna í kíki.

### Skulkar frá gerandisdegnum

Beint fyri jól flutti familjan Kjelnæs heim til Føroyar at búgva aftan á trý ár í Danmark.

Men áðrenn tey komu upp á pláss í nýggja heiminum, gjørdu tey av at fara ein tríggjar mánaðar langan lívstúr til USA við børnunum.

- Vit hava tað gott og her er ómetaliga spennandi og inspirerandi. Kenni tað sum, at eg stjali mær tíð saman við børnunum - skulki frá gerandidegnum, sigur hon myndaliga.

Marjun S. Kjelnæs hevði søkt Mentanargrunnin um stuðul til fleiri verkætlanir, millum annað eitt stuttsøgusavn og eina skaldsøgu, sum hon longu eru farin undir, og fleiri barnabøkur.

Fyri nøkrum árum síðani fekk Marjun starvsløn í 2 mánaðir og eina aðru ferð í 4 mánaðir.

Í borgarliga starvinum avloysir hon sum sjúkrasystir.

- Men tað verður nú av ongum. Tí nú fari eg sjálvandi heim at skriva, sigur hon so fyndarglað hesa náttina av einum motelli í Texas.

Telefonin skurrar, ljóðið hvørvur í heilum og síðstu orðini, áðrenn hon avbrýtur, er vælkendi setningurin frá manninigini umborð á Apollo 13, sum ongantíð lendi á mánanum:

- Huston we have a problem!

## FAKTA

Marjun S. Kjelnæs er fødd í 1974 og uppvaksin í Havn.
Hon er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur.
Hon hevur vunnið stuttsøgukapping í Dimmalætting, fekk aðru virðisløn í stuttsøgukapping á Listustevnu Føroya í 2001 og fyrstu virðisløn fyri útvarpsleik á Listastevnu Føroya í 2002.
Hon hevur eisini skrivað stuttsøgur í Birting og Atlantic Revue.

**Útgávur:**
2001 Kópakona í Mjørki í heilum
2004 Ein farri av kolvetni
2006 Tað svarta portrið í Míni jólabók
2007 Og tú fert rennandi í Vencili 2
2007 Hvør fjalir seg í postkassanum?
2008 Hvør fjalir seg í ferðataskuni?

**Heiður:**
2001 Listastevna Føroya, 2. virðisløn
2002 Listastevna Føroya, 1. virðisløn
2004 Gávugóðs úr Grunni Thorvald Poulsens av Steinum
2008 Barnabókavirðisløn Tórshavnar býráðs
2008 Virðisløn í stuttsøgukapping fyri ungdóm
2009 Trý ára starvsløn frá Mentanargrunninum

***Kelda:** Bókadeild Føroya Lærarafelags*

## Mentanargrunnur Landsins

**Hesi fingu starvsløn í 2009:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Marjun Syderbø Kjelnæs | 3 ár |
| 2. | Jens L. Thomsen | 6 mánaðir |
| 3. | Jóhannus á Rógvu Joensen | 6 mánaðir |
| 4. | Marianna Hoydal | 4 mánaðir |
| 5. | Marianne Clausen | 4 mánaðir |
| 6. | Hans Egholm | 3 mánaðir |
| 7. | Helle T. Johansen | 3 mánaðir |
| 8. | Inger Smærup Sørensen | 3 mánaðir |
| 9. | Jústinus Leivsson Eidesgaard | 3 mánaðir |
| 10. | Súsanna Tórgarð | 3 mánaðir |
| 11. | Anna Kristin Bæk | 2 mánaðir |
| 12. | Astrid MacDonald | 2 mánaðir |
| 13. | Hugin Eide | 2 mánaðir |
| 14. | Kirsten Brix | 2 mánaðir |
| 15. | Ole Wich | 2 mánaðir |
| 16. | Tóroddur Poulsen | 2 mánaðir |
| 17. | Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð | 1 mánaður |
| 18. | Elin Henriksen | 1 mánaður |
| 19. | Guðrið Hansdóttir | 1 mánaður |
| 20. | Jóhan Martin Christiansen | 1 mánaður |
| 21. | Jóhan Mortensen | 1 mánaður |
| 22. | Lena Anderssen | 1 mánaður |
| 23. | Magnus Johannessen | 1 mánaður |
| 24. | Niclas Johannesen | 1 mánaður |
| 25. | Oddfríður Marni Rasmussen | 1 mánaður |
| 26. | Sólrun Mohr | 1 mánaður |
| 27. | Terji Rasmussen | 1 mánaður |